Verkamannafylkingin

Samgongupolitikkurin seinastu 4 árini

Eg fari at loyva mær at nevna nøkur dømi, sum samgonguflokkarnir seinastu 4 árini áttu at lagt sær í geyma. Teir hava latið hesi mál ligið á láni og sostatt misrøkt tey:

Sjúkrahúsini eru mest sum lamd av læknatroti vegna vánaligar arbeiðsumstøður og tvørrandi pening í fløgur og annað.

Stórir bíðilistar eru á øllum røktarheimum. Heimarøktin er skorin inn á bein. Hjá rørslubrekaðum og menningartarnaðum er støðan at sammeta við hana, sum valdar í londum sum Kenya.

Pensiónistarnir hava ikki fingið tað, teir av røttum eiga. Hóast pensiónirnar eru prístalsviðgjørdir í áravís – hetta fylgir við blokkinum – so hava pensiónistarnir ikki fingið peningin. Teir eru um 2.000 kr. afturúrsigldir um mánaðin, bornir saman við danskar fólkapensiónistar.

Okkurt um 1.000 fólk eru dottin úr ALS-skipanini higartil í ár. Av teimum er bert ein lítil bólkur, sum lúkar armóðskrøvini hjá Almannastovuni og so statt fær forsorgarhjálp. Ein stórur bólkur er ongastaðni skrásettur sum arbeiðsleysur, og hesi fáa onga hjálp. Tey eru snøgt sagt slept upp á fjall. Hetta merkir, at talið á arbeiðsleysum er nógv størri, enn tey um leið 1.000 skrásettu á ALS.

Eg kundi hildið fram við at rokna upp misrøkisskap frá teimum ráðandi. Hetta hava allir flokkar, sum hava sitið í Tinganesi seinastu 4 árini, ábyrgd av.

Nú, ið stundar til val, eru teir vaknaðir úr dvala og kappast um at lova gull og grønar skógir. Pensiónistarnir skulu fáa nakað meir í pensjón, heimarøktin skal betrast, sjúkrahúsini fáa sítt, arbeiði til allar hendur og so framvegis.

Munnu hesir flokkar vænta, at veljarin letur seg lumpa eina ferð enn av teirra valagni.

Hjartamálið hjá okkum í Verkamannafylkingini hevur frá byrjan verið at skapa eitt samfelag, har rúm er fyri øllum borgarum, bæði teimum, sum skapa samfelagnum peningin, og eisini teimum, sum ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til lívsins uppihald; tað verði seg av sjúku ella øðrum orsøkum.

Raðfestingin í figgjarlógini má broytast, so almanna- og heilsumál verða sett fremst. Hetta fer at forða fyri, at óskilið, sum nú valdar, heldur fram.

Vit í Fylkingini hava sum fremsta mál, at pensiónistar og óhjálpin skulu fáa sítt. Vit vilja útbyggja heimarøktina, so at tey, ið ringast eru fyri, eitt nú fólk, ið bíða eftir røktarheimsplássi, kunnu fáa hjálp alt samdøgrið.

Vit vilja streingja á at fáa sjúkrahúsverkið aftur á rættkjøl.

Fylkingin hevur ta áskoðan, at fiskur ikki skal fara óvirkaður av landinum, men at vit skulu arbeiða okkum burtur úr kreppuni við millum annað at tilvirka fiskin meira, so betri prísur fæst. Vit skulu ikki bert vera rávøruútflytarar, men eisini selja vøruna »grýtuklára«.

Ein atkvøða til Verkamannafylkingina er ein atkvøða fyri betri korum hjá verkafólki og teimum veikastu samfelagsbólkunum.

Veljið lista I.

Sunneva Tyril,
valevni fyri Eysturoynna

Umboð Fylkingarinnar á løgtingi



Nú verður val aftur um bert fáar dagar; og tað, vit hava hoyrt frá gomlu flokkunum, ið bjóða seg fram aftur, er sama gamla endurspælda plátan.

Teir vilja gera alt fyri okkara gomlu og veiku, nú skilja teir støðuna hjá okkara brekaðu og vilja gera nakað fyri at bøta um korini hjá teimum

Hetta hava teir sagt seinastu nógvu árini, men hvat hava teir gjørt?

Er tað lættari at vera pensionistur í dag?

Er tað lættari at vera brekaður í Føroyum í dag?

Er tað lættari at vera lágløntur ella arbeiðsleysur?

Nei, tað er onki lættari, ongin av teimum flokkum, ið hava sæti í samgonguni, hava gjørt tað lættari fyri hesar bólkar. Bert til hvørt løgtingsval kenna hesir flokkar tey veiku í okkara samfelag.

Verkamannafylkingin fer til val uppá at arbeiða fyri, at hesir bólkar skulu fáa tað betri í okkara samfelag. VMF er ein nýggjur flokkur, ið hevur vilja til at broyta hetta samfelag, so rúm er fyri øllum.

Tí er umráðandi, at Verkamannafylkingin fær umboð á Føroya Løgting. Vilja tit eitt betri samfelag við meiri rættvísi, rættartrygd, betri sømdum fyri verkafólk, betri kor fyri okkara veiku og eldri, betri kor fyri okkara útróðrarmenn o.s.fr., er bert eitt at gera, góði veljari, at seta krossin við lista I.

Ingeborg Vinther,
løgtingslimur

Hvar er trúvirðið hjá nýggju javnaðarumboðunum?



Fyri stuttum kom so speiskliga frá nýggja javnaðarmanninum Kristian Magnussen, at Fylkingin var komin á gravarbakka. Eisini vísti hann á, at krøvini, ið teir fingu frá landsnevnd VKFs kundu ikki livast uppá. – Fór enntá so langt sum at samanlíkna okkum í Verkamannafylkingini við eina »sekt«.

Tað, sum var feilurin, var, at hvørki Kristian Magnussen ella hini megnaðu ella vildu føra tann politikk, flokkurin fór til val uppá í 1994.

Hetta førdi sjálvandi til trupulleikar, tí VMF vil halda givin lyfti. Endin var so tann, at hesir máttu fara úr flokkinum, tí teir ikki vildu standa við tey vallyfti, ið givin vóru.

Teir, ið ikki kundu brúkast í Verkamannafylkingini, valdu at føra borgarligan politikk og enntá fara í samgongu við Fólkaflokkin.

Flest øll minnast Kristian Magnussen, tá hann ferð eftir ferð segði, at Fólkaflokkurin mátti haldast uttan fyri politiska ávirkan fyri ein hvønn prís. Sami maður fór í samgongu við Fólkaflokkin at føra fólkaflokspolitikk. – Ja, soleiðis roynast álitismenn.

Vóni, at veljarin minnist til hetta. Vit minnast eisini, tá sami maður segði Føroya fólki, at nú fór hann at stovna nýggjan flokk, ið skuldi vera til vinstru fyri Javnaðarflokkin, tí hesin er ov borgarligu. – Forhánisliga og illa fór hann við tí flokki, hann í dag er valevni hjá.

Eitt gamalt orð sigur: »Ofta etur hundur tað, hann havnar«. Hetta tað, hann spýr.

Hesi orð passa væl til hendan nýggja javnaðarmannin.

So ikki skulu veljarar vænta sær nógv frá persóni, ið skinklar frá síðu til síðu uttan mið og mál.

Verkamannafylkingin stendur við tað, hon bleiv stovnað uppá; ongi lyfti verða svikin ella gloymd.

Hon fer til val uppá at gera hetta samfelag til eitt betri samfelag at liva í fyri okkara borgarar, og serliga fyri at bøta um korini hjá teimum veiku og lágløntarbólkunum.

Vit halda ord. – Verkamannafylkingin, besta boðið fyri framgongd og rættvísi. – Kross við lista I!

Gott val.

Ingeborg Vinther,
løgtingslimur

Ábyrgdarflokkur



Verkamannafylkingin hevur valevni, ið bjóða seg fram, og sum eru fús til verka fyri at gera eitt gott arbeiði fyri land og fólk.

Vit hava hoyrt, at VMF er komin á gravarbakka – ein atkvøða til Fylkingina er burturspilt. Hvørji eru tey, ið koma fram við slíkum?

Hetta eru umboð fyri flokkar, ið stýrdu alt út av avgrundini. Hesir stýrdu soleiðis, at tá peningastovnarnir og alt vinnulívið fór um koll, var tað føroyski skattaborgarin, ið skuldi gjalda alla skuldina hjá teimum privatu, tí hendan skuld endaði, sum øll vita, í landskassanum.

Hesir flokkar, ið stýrdu øllum um koll, hava ikki broytt hugburð. Ikki ein av hesum flokkum hevur lært nakað av tí, teir koyrdu samfelagið út í.

Einasta loysn at fáa eina betri stýring av okkara samfelag, er at geva Verkamannafylkingini ávirkan á landsins stýri, so avgerðir, ið tiknar verða, verða tiknar við ábyrgd

Okkara er ein ábyrgdarflokkur.

Setið tí krossin við lista I!

Ingeborg Vinther,
løgtingslimur

